

**Nýtt slag av sjónleiki í Føroyum**

Alzheimerfelagið hevur aðalfund tann 25.apríl, og tá verður frumsýning av leikinum »Svíkja vit Hannis«.

Tað eru starvsfólk og onnur, sum framføra sjónleikin, ið snýr seg um fólk við demenssjúkum.

Birita Mohr úr Leikhúsinum Gríma hevur stuðlað undir tiltakið, sum Alzheimerfelagið hevur tikið stig til. Hetta er ikki roynt fyrr um okkara leiðir, og tískil hava sjónleikararnir fingið hjálp frá danska Forumteater.

Sjónleikurin krevur av hyggjarunum, at teir fylgja væl við, tí teir eru eisini partur av framførsluni. Teir verða nevniliga bidnir um at taka støðu til teir trupulleikar, sum sjónleikurin vísir teimum.

Sjónleikurin er at síggja sunnudagin 25. apríl kl. 16.00 í auluni á Føroya Læraraskúla.

hkm

**Jenis spyr um fosturtøku**

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, hevur fingið fyrispurning frá Jenisi av Rana, løgtingsmanni, um kanningar og viðgerðir av føroyskum fostrum. Jenis spyr millum annað, um føroyingar skulu fylgja dønum í tilmælinum um at nýta sokallaðar nakkalegdarskanningar. Hesar kanningar kunnu avdúka Downs syndrom.

Jenis av Rana úr Miðflokkinum sigur, at endamálið við fyrispurninginum er at finna útav, hvussu tengdir føroyingar eru at dønum, tá tað snýr seg um kanningar av fostrum og tí viðvíkjandi.

hkm



*Í hesum døgum liggja menn og pussa og polera gamlar súkklur og gamlar bilar. Flaggdagurin er dagurin, tá hesi gomlu akfør verða »luftað« – fleiri teirra síggjast í gøtunum gjøgnum summarið*

# Ellisakførini verða »flotað« flaggdagin

**Trettanda árið á rað fara limir í Føroya Ellisakførum at sýna fram gomul akfør í Havn. Tað er siður, at ellisakførini verða »flotað« flaggdagin**

ELLISAKFØR
*Tíðindaskriv*

Eins og í fjør møtast ellisakførini á Shellstøðini við Ringvegin, haðani koyrt verður oman á Kongabrúnna kl 14. Á Kongabrúnni verða akførini sýnd fram til flaggdagshaldið byrjar, og síðani fara tey í raðkoyring niðan aftur á Shell-støðina við Ringvegin, har tey verða sýnd fram til kl 17.

Á Shell-støðini verður kaffi og winerbreyð at fáa – og okkurt gott til børnini eisini.

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør varð stovnað í 1992. Endamálið er at varðveita gomlu akførini í upprunastandi og at fáa til vega vitan og kunnleika um akfør, ferðslu og flutning upp gjøgnum tíðirnar. Felagið arbeiðir eisini við at savna føroysku bilasøguna, sum ætlanin er at geva út í bók.

Fyrsti bilur kom til Føroya 6. mai í 1922, tað var ein Ford TT lastvognur, sum Johannes Olsen og Júst Sivertsen í Havn keyptu frá Vilhelm Nielsen og Wenzel Petersen, sum høvdu smiðju í Quillingsgarði í Erling Jalsgøtu í Havn.






**Fyrispurningur frá Heidi**

Heidi Petersen, løgtingskvinna, hevur sett landsstýrismanninum í innlendismálum, Jógvani við Keldu, fyrispurning um løgregluna í Føroyum. Heidi Petersen spyr, um landsstýrismaðurin er kunnaður um ætlanirnar hjá donsku løgregluni um at skerja virksemið í Vágunum og at niðurleggja sýslumannsstarvið í Vestmanna.

Heidi Petersen, limur í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum, heldur tað vera týdningarmikið, at føroyingar hava avgerðarrætt og vald á løgregluni. Hetta heldur hon, tí hon metir, at løgreglan hevur sera týdningarmiklar uppgávur at røkja í føroyska samfelagnum.

**Álit um grundlóg handað løgmanni**

Grundlógararbeiðið hevur verið ávegis í longri tíð, og nú røkist okkurt fyri, at føroyingar fara at síggja eina ítøkiliga grundlóg. Í gjár varð grundlógarálitið nevniliga handað Føroya Landsstýri. Tað er grundlógarnevndin, sum hevur arbeitt við hesum álitinum. Tað var Føroya Løgting, sum á vári 1999 samtykti, at táverandi landsstýri skuldi seta nevnd at gera føroyska grundlóg. Nú er arbeiðið komið so langt, at grundlógarnevndin hevur latið álit úr hondunum, sum tó ikki er tað endaliga álitið.

**hkm**

**Fleiri tiltøk á flaggdegnum kring landið**

Flaggdagurin er sunnudagin 25. apríl, og fleiri flaggdagstiltøk eru kring landið. Í Kaldbak byrjar flaggdagshaldið klokkan 15:00, og børnini í bygdini fara at ganga skrúðgongu. Tað er Rógvi Reinert, sum í Kaldbak fer at halda røðuna. Í Leirvík byrjar hátíðarhaldið klokkan 16:00, og har er tað Heri Tróndheim, sum flytir fram røðu. Í Skálavík gera tey eisini nógv burturúr, og har er tað Vár Berghamar Jacobsen, ið førir fram flaggdagsrøðu. Vár kenna vit millum annað frá sjónvarpssendingunum Likku-likkuleia. Á skránni er eisini skrúðgonga úr skúlanum í Skálavík oman á Keldu.

**hkm**

**Javnaðarformaður fall**

Formaðurin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, Bjarki Mohr, varð ikki afturvaldur í nevndina, tá ið felagið hevði aðalfund í vikuni.

Tríggir nevndarlimir stóðu fyri valið, og formaðurin fall saman við Bente Kjær. Bergur Dam, stóð eisini fyri vali, men hann varð afturvaldur.

Nýggj fólk í nevndini hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag eru Jan Poulsen og Joan Ziskason.

Nevndin skipar seg sjálv.

**Stóru áhugi fyri OB og FCK**

Stórur áhugi er fyri superligadystinum millum OB og FC Keypmannahavn, sum skal spælast 1. mai. Longu nú eru 7.000 atgongumerki seld, og møguleiki verður fyri, at Odense Stadion verður útselt til dystin. OB hevur roynt at vinna inn á tey trý oddaliðini í superliguni, og í dystinum móti FCK fær liðið, har Jákup á Borg er ein av spælarunum, ein seinasta møguleika at blanda seg upp í gullstríðið. Longu fýra dagar seinni spæla OB og FCK enn ein avgerandi dyst á Odense Stadion, tá er tað seinna hálvfinalan í steypakappingini.

**Kerry og drotningin í famlju**

Amerikanska forsetalvalevni John Kerry og danska drotningin Margretha eru í familju. Tað sigur redaktørurin fyri bretsku aðalbøkurnar Burke's Peerage. Harold Brooks-Baker vil vera við, at John Kerry er eftirkomari av fyrsta guvernørinum í Massachusetts, og gjøgnum hann hevur blátt blóð í æðrunum.

– John Kerry er ikki bara í familju við bretsku drotningina, hann er eisini av somu ætt sum hollendska drotningin, danska drotningin og norski kongurin, sigur Harold Brooks-Baker.

Hann heldur, at John Kerry fer at vinna forsetavalið ímóti George Bush, tí hann hevur meira blátt blóð æðrunum enn forsetin.

– Eg rokni við Kerry. Tann, sum hevur meira kongaligt blóð í æðrunum, vinnur altíð, sigur bretski redaktørurin.

**10 ára gamal granskari**

Ein 10 ára gamal drongur í Danmark hevur fingið eina granskingarvirðisløn. Christopher Trung Paulsen, sum gongur í 3. flokki á Dyhrs Skúla í Slagelse, vann kappingina Ungir Granskarar 2004 fyri eina uppgávu um atomir og mýl.

Christopher Trung Paulsen hevur ikki alisfrøði í 3. flokki, men hann fær serfrálæru frá einum alisfrøðislærara á skúlanum.

Sjællands Tidende skrivar, at Christopher jú hevur lisið trý tjúkk bind um norðurlendsku gudalæruna, og at hann ger heimasíður um miðøldina og Vietnam, har hann er føddur.

# Kappingarneytar gera avtalu



Føroysku fjarskiftisfyritøkurnar Føroya Tele og Kall hava gjørt samstarvsavtalu um ADSL. Avtalan ber í sær, at Kall í eini royndartíð upp á tríggjar mánaðir skal bjóða útvaldum royndarkundum fast og skjótt internetsamband. Tænastan verður bjóðað umvegis kervið hjá Føroya Tele. Tá royndartíðin so er av, fer Kall at bjóða fast internetsamband til kundarnar. Alt røkist tískil fyri, at føroyingar fáa meira kapping á internetøkinum, og kundarnir kunnu tí vænta sær ein lægri prís fyri fast internetsamband.

**hkm**

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM




Bilur + 2 fólk til Danmarkar úr 2.720,-

**Føroyar – Danmark** ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.720 | 3.200 | - | - | - | 4.320 |
| Bilur + 3 fólk | 3.580 | 4.300 | - | 5.110 | 5.530 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.440 | 5.400 | 6.080 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.300 | 6.500 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.720 | 4.160 | - | - | - | 5.800 |
| Bilur + 3 fólk | 4.780 | 5.440 | - | 6.820 | 7.420 | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.840 | 6.720 | 7.560 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 6.900 | 8.000 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Noregs úr 1.960,-

**Føroyar – Noreg** ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin

| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.960 | 2.280 | - | - | - | 2.920 |
| Bilur + 3 fólk | 2.640 | 3.120 | - | 3.600 | 3.840 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.320 | 3.960 | 4.440 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.000 | 4.800 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.480 | 2.960 | - | - | - | 3.760 |
| Bilur + 3 fólk | 3.300 | 4.020 | - | 4.620 | 5.100 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.120 | 5.080 | 5.720 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.940 | 6.140 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Hetlands úr 1.420,-

**Føroyar – Hetland** ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin

| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.420 | 1.710 | - | - | - | 2.240 |
| Bilur + 3 fólk | 1.860 | 2.295 | - | 2.715 | 2.970 | |
| Bilur + 4 fólk | 2.300 | 2.880 | 3.280 | - | - | 3.940 |
| Bilur + 5 fólk | 2.740 | 3.465 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.880 | 2.240 | - | - | - | 2.900 |
| Bilur + 3 fólk | 2.460 | 3.000 | - | 3.480 | 3.810 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.040 | 3.760 | 4.160 | - | - | 5.080 |
| Bilur + 5 fólk | 3.620 | 4.520 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Íslands úr 2.330,-

**Føroyar – Ísland** ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjörður ella hinvegin

| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.330 | 2.650 | - | - | - | 3.530 |
| Bilur + 3 fólk | 3.045 | 3.525 | - | 4.185 | 4.545 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.760 | 4.400 | 4.960 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.475 | 5.275 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.080 | 3.440 | - | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 4.020 | 4.560 | - | 5.460 | 5.940 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.960 | 5.680 | 6.480 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.900 | 6.800 | - | - | - | - |

Prísirnir í lágárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE